Útboð

**Robottar til reingerð á Glasi**

Glasir ætlar at brúka robottar ísv. reingerð av stóru gólvflatunum á Glasir. Í hesum sambandi verður biðið um tilboð uppá robottar til uppgávuna (dustsúgving og vask).

Økini talan er um eru serliga balkongir, felagsøki knýtt at balkongunum, stór høli, høvuðsinngongd og gangir.

Fyri at minimera talið av eindum er tað er ein fyrimunur, at veitta útgerðin sjálvvirkandi kann brúka lyft á Glasi og harvið sjálv kann ferðast millum hæddirnar eftir tørvi, t.d. um náttina, so útgerðin ger reint tá virksemi er lítið í bygninginum. Alternativt, at útgerðin lætt kann flytast millum hæddir um dagin, er løtt at handfara, fyllur lítið og lítið sjónlig í bygninginum.

Tað kann vera ein fyrimunur, at robottarnir bæði kunnu vaska og støvsuga, men tað er ikki eitt krav.

Robottarnir skulu sjálvvirkandi kunna finna aftur til løðistøðina ella aðra neyðuga støð ella staðseting tá reingerðin er av.

**Lýsing av økjum – sí eisini viðløgdu kort**
6. hædd: Balkon og tilhoyrandi felags øki. Umleið 440 m2.
5. hædd: Balkon og tilhoyrandi felags øki. Umleið 440 m2.
4. hædd: Balkon og tilhoyrandi felags øki og høvuðsinngongd við nógvari ferðslu.
Umleið 620 m2 + inngongd á umleið 145 m2.
3. hædd: Balkon, kantina við nógvum møblum og gongd til undirvísingarhøli. Umleið 1.000 m2.
2. hædd: Gongir umleið 234 m2
1. hædd: Ítróttarhøll og gongd. Umleið 1.200 m2.

**Veiting**
Í tilboðið skal vera íroknað uppseting, gera neyðuga forriting/kort fyri reingerð og íbinding í elevator skipan soleiðis, at útgerðin virkar eftir ætlan tá hon verður avhendað.

**Dygd**
Viðvíkjandi dygd verður mett um snið, góðsku, haldføri, brúkaravinarligheit og reingerð. Stigatal er frá 0 – 10 byggir á eina heildarmeting. Rakstrartrygd er umráðandi, tí "uppitíðin" er umráðandi.

**Tænasta**
Umráðandi at steðgur ikki kemur í reingerðina, tí er tænasta ein týðandi partur av metingini av innkomnu tilboðunum. Tillagingar, umvælingar o.a. skulu skjótt kunna fremjast. Tilvísing til líknandi veitingar er ein fyrimunur.

**Meting**
Tilboðið við hægsta karakteri, eftir at hesin er vektaður prís 70%, dygd 20%, tænasta 10%, vinnur útboðið.

Til ber at seta spurningar til Glasir, Álvur Jøkladal, leiðara á bygningsumsitingini á alj@glasir.fo.

Spurningarnir skulu vera inni í seinasta lagi 12. desember 2024. Møguligir spurningar og svar verða løgd á keypsportalin.

| | |
|---|---|
| Sýn av hølum: | mikudagin 11. Desember 2024. |
| Spurnarfreist: | hósdagin 12. Desember 2024. |
| Freist at lata tilboð inn: | týsdagin 17. Desember 2024 kl. 12:00 |
| Tilboð latin upp: | mikudagin 18. Desember 2024 |
| Vinnari kunngjørdur: | hósdagin 19. Desember 2024. |
| Veitingardagur: | í seinasta lagi 31. Januar 2024. |

**Mannagongd og krøv**
Tað er ein fyrimunur, um veitarin kann vísa vøruna fram. Er vøran ikki á goymslu so kanska vísa á kunda, har møguligt er at síggja líknandi vøru.

Glasir tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum ella part av hesum.

Glasir skilar sær rætt til at havna einum tilboði (sum um talan var um undangóðkenning), um vøran á órímiligan hátt ikki livur upp til ynskini í útboðstilfarinum.

Tilboð, íroknað fylgiskjøl, skulu sendast til alj@glasir.fo

Glasir desember 2024